## Archi Black í Ribarhúsi

Í dag letur Archibald Black upp fríggjadagin í Ribarhúsi í

Fríggjadagin læt Archibald Black upp listaframsýning í listaskálanum Ribarhúsi í Fuglafirði.

Tað er Ribarhús, sum hevur boðið Archibald Black at sýna fram til 7. mars.

Umframt oljumálningar, eru tusch, kol-, svart- og reyðkritstekningar at síggja.

Archibald Black er kent navn í Klaksvík, men tað er ikki ofta at hann er at síggja uttanfyri bøgarðarnar har norðuri.

Tó at hann hevur havt framsýningar í Danmark, Noregi og Svøríki. Men hetta er fyrstu ferð, hann fram í Riberhhús

Framsýningin er opin mánadag til fríggjadag frá kl. 15.00 til 17.30 og leygardag frá 11.00 til 13.00.



## Friðarligasta vikuskifti í langa tíð

Hetta hevur verið eitt tað friðarligasta vikuskifti í langa tíð.

Tað staðfestir løgreglan í morgun.

Ein er tikin fyri at koyra við kenning í morgun, men tað hendi onki. Ein annar maður er tikin fyri at koyra prutl við kenning, men hann sleppur við eini bót.

Tað er at kalla tað einasta, sum hevur órógvað løgregluna alt vikuskiftið.

Annars sigur løgreglan, at tað er mangan friðarligari síðst í mánaðin, enn tað plagdi vera, tí lønirnar eru ikki komnar og ráðini til at fara í býin eru ikki tey somu.

Samstundis hevur veðrið ikki verið tað besta og tað fær eisini fólk at leita undir tak, heldur enn at ganga úti á gøtuni

-áki

# Pedagogar stuðla børnum og ungum



*Jarvin Feilberg Hansen handar forkvinnuni í Barnabata eina troyggju og samstundis setti hann innavningina til frama fyri barnabata ígongd. Troyggjan, sum forkvinnan fekk, er reyð, sjálvur er Jarvin í eini svartari og tær fáast eisini bláar og morreyðar*

**Í Pedagogfelagnum eru tey farin at selja troyggjur, har 30 krónur av hvørjari troyggu fara óskerdar til Barnabata**

VÆLGERANDI ARBEIÐI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í Pedagogfelagnum eru tey eisini farnir undir vælgerðandi arbeiði.

Í hesum sambandi er felagið farið at savna pening inn til Barnabata, sum er ein felagsskapur, ið varar av einum øki, sum pedagogar sjálvsagt eisini vara av, nevniliga børnum og ungum.

Men felagið ger hetta á ein hátt, sum vit ikki síggja so ofta í Føroyum.

Jarvin Feilberg Hansen, formaður í Pedagogfelagnum, sigur, felagið hevur gjørt eina rúgvu av troyggjum við navninum á Pedagogfelagnum á.

Troyggjurnar kosta 180 krónur, men 30 krónur av hvørjari troyggju fara óskerdar til arbeiðið hjá Barnabata.

Á aðalfundinum hjá pedagogfelagnum leygardagin, fekk forkvinnan í Barna bata eina troyggju frá pedagogfelagnum og samstundis varð ætlanin almannakunngjørd.

Og hetta fekk góða undirtøku, tí longu fyrst dagin vórðu 400 troyggjur seldar og sostatt hevur Barnabati longu fingið 12.000 krónur í kassan.

Jarvin Feilberg Hansen sigur, at tey, sum hava huga at ogna sær eina troyggju, kunnu bara venda sær til felagið. Troyggjurnar fáast í ymsum litum, svartar, reyðar, morreyðar og bláar.

Forkvinnan í Barnabata, Marita Tórsheim, takkaði fyri. Peningurin skal brúkast til barna- og ungdómsráðgevingina hjá Barnabata, sum gongur undir heitinum "Tú hevur rætt". Endamálið er í høvuðsheitinum at upplýsa børn teirra rættindi.

Í hesum samandi hevur Barnabati ein portal á alnetinum. Tann heimasíðan eitur www.eg.fo og har kunnu børn og ung kjakast, spyrja og fáa upplýsingar.

# Vilja hava tíð at fyrireika seg

**Tá ið lønarsamráðingar verða aftur í heyst, vilja pedagogarnir hava, at beinleiðis arbeiðstíðin verður sett niður, so at teir fáa fyrireikingartíð, akkurát sum lærarar**



*Pedagogar vilja nú hava niðurskurð í arbeiðstíðini so at teir fáa stundir at fyrieika seg til uppgávurnar á stovnunum. Eini 300 fólk vóru á aðalfundi í Pedagogfelagnum leygardagin*

SÁTTMÁLAKRØV

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Pedagogarnir eru longu farnir at leggja lunnarnar undir næstu lønarsamráðingarnar við Fíggjarmálaráðið, sum vera longu í heyst.

Á aðalfundinum hjá pedagogfelagnum leygardagin, tosaðu tey eisini um lønarsamráðingarnar nú sáttmálin fer úr gildi 30. septembur.

Jarvin Feilberg Hansen, formaður í felagnum, staðfestir, at nógvar viðmerkingar vóru til sáttmálan.

Men skal ein reyður tráður spinnast burturúr øllum viðmerkingum, má tað vera, at pedagogar vilja nú hava fyrireikingartíð, akkurát, sum lærarar hava.

Hann vísir á, at ein vanlig arbeiðsvika er 40 tímar. Men lærarar undirvísa 27 tímar um vikuna og sostatt hava teir 13 tímar um vikuna til fyrireikingar og annað.

Og nú vilja pedagogar hava somu sømdir.

Formaðurin í felagnum vísir á, at í øðrum londum hava pedagogar fyrireikartíð. Hann nevnir at í Íslandi hava pedagogar fimm tímar um vikuna í fyrireikingartíð.

Men so hava teir hesar fimm tímarnar færri til arbeiðis inni á sjalvum stovninum.

– Tað er avgjørt nakað tað sama, vit skulu inn á í Føroyum, so hetta fer avgjørt at liggja frammaliga, nú vi skulu gera krøvini upp til komandi samráðingarnar, leggur hann afturat.

Umframt hetta vóru sjálvandi eisini nógvar viðmerkingar um lønarhækkingar og aðrar ábøtur í sáttmálanum, sum hann ikki vil nágreina enn.

### Kunnu brævatkvøða

Annars vóru 300 fólk á aðalfundi í Pedagogfelagnum. Felagið fekk ein nýggjan nevndarlim. Tað er Sigga Joensen úr Fuglafirði, sum varð vald fyri Rógva Fossádal, sum ikki stilllaði uppaftur. Jógvan Philbrow stóð eisini fyri vali og hann varð afturvaldur.

Á felagnum varð eisini tann lógarbroyting gjørd, at nú er ber ikki longur til at skjóta valevni til nevndina á sjálvum aðalfundinum.

Men nú skulu valevni til aðalfund skjótast upp í góðari tíð fyri aðalfundin og so skal tað eisini bera til at atkvøða við brævatkvøðu.

# Spenningur í luftini

**Tað dylist ikki at spenningur var í luftini á Hotel Føroyum seinnapartin leygardagin, tá ið Starvsmannafelagið og almennu arbeiðsgevararnir hittu semingsmenninir fyri eini løtu síðani**

SEMINGSROYND

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú verður tað, at tað røkkur ella støkkur.

Seinnapartin leygardagin byrjaðu seinastu royndirnar at finna semju um ein nýggjan sáttmála ímillum Starvsmannafelagið øðrumegin og Fíggjarmálaráðið, SEV og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hinumegin.

Semingsroyndirnar byrjaðu á Hotel Føroyum seinnapartin klokkan 14. Fyrst hittu semingsmenninir, Jógvan Amonsson og Alfred Petersen, allar partar á fundi og síðani varð lagt til brots av álvara.

Og sum vanligt, verður tað ógvuliga avmarkað, hvat almenningurin fær at vita ímeðan semingsroyndirnar eru, tí nú skal onki sigast, sum upp á nakran máta kann órógva tingingarnar.

Sáttmálin gekk út í heyst og partarnir samráddust rættiliga leingi um enn langur støðgur var ímillum.

Men at enda máttu teir ásanna, at tað bar ikki til at koma á mál og sostatt vóru semingsmenninir boðsendir. Og teir fóru so undir semingsroyndirnar nú seinnapartin.

Hvussu leingi semingsroyndirnar vara, er ómøguligt at siga, men onkur av semingsfólkunum helt fyri, at vardi tað fleiri samdøgur, skuldi tað ikki koma óvart á nakran.

Tað er mest lønin, sum skilir partarnar. Men tað eru eisini onnur viðurskifti, sum teir ikki vilja siga so nógv um. Hinvegin er tað onki dulsmál, at Starvsmannafelagið dyrdir eftir einum fýra ára sáttmála.

Spurningurin er so um Fíggjarmálaráðið, SEV og kommunurnar eru til reiðar at smyrja so nógv kjøt á ein fýra ára sáttmála, at Starvsmannafelagið fær svølgt hann.